†

Kunngjørt verður, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Rasmina Dam**
**frá Norðskála**

andaðist í heiminum mánadagin 10. mai, 83 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju hósdagin 13. mai kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ása, Bjarnhild, Bjartur og Steinbjarta**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at maður, pápi, abbi og bróðir okkara

**Ragnar Johansen**
**úr Vági**
lærari í Naksskov

andaðist 9. mai, 67 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Nicolaj kirke í Naksskov hósdagin 13. mai.

**Else, Anna Elisabeth, Rakul, Ark og Finnur**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra mamma, vermóðir og omma okkara

**Emma Kruse**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Hjartaliga takk fyri peningagávur til barnalegurnar í Grønlandi.
Eina serstaka tøkk til starvsfólkið á Ellisheiminum í Havn.

**Poul Einar, Una og Kristian**

### Dagurin

**12. mai. Pancratius**, deyður imleið ár 300. 13 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

# Føroyingur hitar sessin hjá krúnprinsinum

**Seinasta leygardag vórðu danska Linda og hálvi føroyingurin Poul Hansen vígd í Vor Frue kirke í Keypmannahavn. Tað serstaka við tí er, at hetta var seinasta vígslan í kirkjuni, undan Fríðriki krúnprinsi og Mary Donaldson. Fjølmiðlarnir gjørdu nógv burtur úr vígsluni og enntá eitt avstralskt blað skrivaði um hana**

KRÚNPRINSA-BRÚDLEYP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Hálvi havnamaðurin Poul Hansen við sínari prinsessu Linda, í Vor Frue Kirke seinasta leygardag. Tey vóru tey seinastu at verða vígd í kirkjuni undan krúnprinsaparinum*
*Mynd: Mogens Flindt – BT*

Leygardagin varð tann seinasta vígslan hildin í Vor Frue Kirke undan krúnprinsabrúdleypinum í ovurmorgin. Seinasta parið at gifta seg vóru danska Linda og hálvi føroyingurin Poul Hansen.

Poul Hansen er sonur havnarmannin Ingvald Hansen, og mamma hansara eitur Vivi Hansen og er donsk.

Abbi Poul æt Frits Hansen av Reyni í Havn og omma hansara Elisabeth Maria Kristina Joensen, ættað av Hvítanesi.

Henda seinasta vígslan í kirkjuni undan kongaligu vígsluni fór ikki stillisliga aftur við borðinum. Fjølmiðlarnir gjørdu nógv burturúr.

Eitt av bløðunum, sum gjørdi serliga nógv burturúr var BT. Í sunnudagsblaðnum er forsíðuávísing um nýgiftu hjúnini, sum hitaðu upp fyri krúnprinsaparinum. Og á baksíðuni stór grein og tvær myndir av vakra brúðarparinum.

Í BT stendur, at enntá, at ein avstralsk avís eisini var komin at dekka brúðarvígsluna, og tað hevði brúðarparið neyvan roknað við. Ei heldur, at fólk næstan ikki sluppu fram at at blaka rís eftir parinum, tá vígslan var av, fyri myndamonnum hjá teimum ymsu fjølmiðlunum.

Men tey bæði lukkuligu hjúnini lótu ikki til at hava nakað í móti tí, og tey stillaðu glað upp til myndatøku.

### Nógv skemt

Við BT sigur brúðgómurin, at tey hava skemtað nógv við hesum, at tey eru tað seinasta brúðarparið undan sjálvum krúnprinsaparinum.

– Vit hava eitt nú tvætlað við, at vit kunnu bara lata okkara prýði standa, so at Mary og Fríðrikur kunnu lána tað, segði Poul Hansen við BT beint eftir vígsluna.

Tey bíløgdu kirkjuna í juni mánaði í fjør, eftir at Poul hevði lagt seg á knæ og fríggjað til Lindu. Sostatt var hetta langt framman undan trúlovingini hjá Fríðriki og Mary. Men so skjótt sum tíðindini bórust um teirra trúlovilsi, ringdi Poul til kirkjuna fyri at tryggja sær, at tey framvegis kundu verða vígd í henni.

Tey bæði siga við BT, at Vor Frue Kirke er ein ómetaliga vøkur kirkja at verða vígd í. Og BT skrivar, at Linda strálaði sum ein prinsessa, tá hon gekk fram eftir vakra gólvinum framman fyri teimum 70 gestunum, sum tó ikki rúgvaðu nógv upp í stóru kirkjuni. Øðrvísi verður tað helst fríggjadagin, tá øll 1.500 sitiplássini helst verða upptikin.

Eftir vígsluna koyrdi parið vekk í einum amerikanskum bili til Hotel Skjalmhvide, har brúðarveitslan varð hildin.

Og síðani leygardagin hevur kirkjan so verið stongd, meðan allar fyrireikingarnar til tað kongaliga brúdleypið ganga fyri seg.




*BT hevði nýgifta parið á forsíðuni sunnudagin. Og sjálvt ein avstralsk avís fylgdi vígsluni hjá Lindu og Poul*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Blákrossheimið, Lynggøta:

# Blákrossheimið 20 ár á baki

**Hósdagin 6. mai var móttøka á Blákrossheiminum í Lyggøtu í Havn í sambandi við at stovnurin fylti 20 ár. Leiðari á Blákrossheiminum er Olga Magnussen, sum tók við eftir Sólborg Dulavík í 2001**

20 ár eru liðin síðan Blákrossheimið í Havn verð sett á stovn. Byrjað var 6. mai 1984 í Kongagøtu, og í 1987 var flutt niðan í Lynggøtu, har stovnurin hevur hildið til síðan.

Nógv fólk møttu til móttøkuna, og fleiri talur vóru hildnar. Leiðarin á stovninum, Olga Magnussen, beyð vælkomin og segði frá um stovnin. Onnur sum hildu røðu vóru: Jaspur Langgard, aðalskrivari í Bláakrossi Føroya, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, Alfred Petersen, fyrrverandi nevndarformaður, og Martin Kúrberg, starvsfólk á heiminum.

Sólborg Dulavík byrjaði sum leiðari, tá Blákrossheimið varð sett á stovn 6. mai 1984, og var hon leiðari til 2001, tá Olga Magnussen tók við.




*Olga Magnussen er leiðari á Blákrossheiminum í Lynggøtu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í fjør vóru 235 innleggingar, har 63 prosent av teimum vóru rúsdrekkamisnýtarar og hini vóru blandingsmisnýtarar, sum nýta bæði rúsdrekka og onnur rúsevni.

Á Blákrossheiminum eru 11,5 ársverk, har arbeiða lækni, sjúlrasystir, alkoholráðgevi, kokkur, assistentar og náttarvaktir.

Blákrossheimið er eitt viðgerðarheim, har fólk kunnu koma í viðgerð í umleið seks vikur. Eisini hevur stovnurin tilboð um ambulanta viðgerð fyri misnýtarar og teirra avvarðandi.



*Poul Jákup Thomsen, ið javnan heldur fyrilestrar á heiminum, og Bjarni Bæk, dómpróstur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

*Starvsfólk á heiminum: Martin Kúrberg, og Jegvan Bæk, sálarfrøðingur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Móttøka í hugnaligum umhvørvi í Lynggøtu 10, hósdagin 6. mai*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygardagin 15. mai 2004 taka vit við rakstrinum av cafeteria í ítróttarhøllini á Skála. Í tí sambandi verður**

**móttøka**

**leygardagin 15. mai frá klokkan 14.00 til 17.00.**



100 tey fyrstu fáa hvør sín lutaseðil. Drigið verður um ein vinning beint eftir mótasýningina.

**Klokkan 15.00 verður mótasýning við klædnahandlunum Josi og Suðurgarð av Skála, og framsýning av Aloe Vera húðrøkt.**

**Leygardagin letur eisini upp framsýning í Cafeteria við málningum hjá Kristinu Nysted. Framsýningin verður opin í ein mánað.**

**Sp/F JANUSU**
**FO-480 Skála**
**tlf: +298 441850, fartel.: +298 741850**
**e-mail: janusu@janusu.fo, web: www.janusu.fo**